## VIÐMERKINGAR

# Vestmannasund – fast samband Ferðaseðlaprísurin niður i helvt

**Sune Jacobsen**

Fyri nøkrum fáum døgum síðani kundu vit øll frøast um, at seinasta skotið varð latið av í Vágatunlinum. Stórar gongur av fólki úr meginøkinum vóru bodnar við til hátíðarhaldið, og argasti fíggindin av tunnilsætlanini kom kleyrandi sum fyrsti maður tvørtur um seinastu grótrúgvuna.

Vit vanligu vágafólk hava so lisið í bløðunum, hvat henda gonga undirhelt hvønn annan við undir borðhaldinum í bygdarhúsinum í Miðvági. Onkur helt, at nú mátti ferðaseðlakostnaðurin verða so lítil sum gjørligt.

Hetta var ein veitslutala, men veruleikin er, at við skynsemi og góðum samstarvi ber til at fáa prísin nógv longur niður. Sum øllum kunnugt eigur partafelagið Vágatunnilin ognarrætt til lidna tunnilin við tilhoyrani brúgvum og vegi. Og hendan ognarrætt eigur felagið til tunnilin er fult afturgoldin. Tá verður hann latin landinum til ognar.

Vágatunnilin verður mettur at fara at kosta 240 mió. krónur. Av upphæddini hevur løgtingið givið landsstýrinum heimild at seta 160 mió.í partapeningi í felagið. Hinar 80 mió. krónurnar við byggirentu skulu fíggjast við nýtslugjaldi.Landsstýrið skal í minsta lagi frá í dag fram til 2005 gjalda 20 mió. krónur um árið. Men løgtingið hevur ikki sagt, at landsstýrið ikki kann gjalda alt í morgin. Ger komandi landsstýri tað sama sum Karsten Hansen, so skal felagið gjalda rentur av 80 mió. krónum, har tær síðstu ikki koma inn fyrr enn í 2005.

Er tað nøkur grund til, at landsstýrið ikki skal hava goldið sín partapening fyrr enn í 2005, tá tað vónandi verður koyrandi um sundið við ársbyrjan í 2003 ? Haraftrat stendur Landsbankin at bresta av peningi. Jú, tað er ein grund, og hon er einføld. Við at fráskriva sær 365 mió. krónur av blokkinum, bar ikki til at seta meira á fíggjarlógina fyri 2002 enn tær 20 mió. tí so hevði fíggjarlógin víst hall, og tað kunnu fullveldismenninir ikki liva við.

Hin spurningurin, sum verdur er at taka upp, er, hví partafelagið Vágatunnilin skal gjalda fyri vegagerð á Vágalandinum og brúgvagerð á Streymoyarlandinum. Hesar íløgur áttu at verið ein partur av landsvegakervinum. Umframt hetta skal Vágatunnilin gjalda fyri rakstur av áður umrøddu íløgum, til tunnilin er útgoldin. Tá tunnilin er komin til Gásadals, verða 30 km av landsvegi í Vágum. Landsverksfrøðingurin hevur skyldu at halda og kavarudda allar hesar 30 km, men teir síðstu 2 km oman til Vágatunnilin skulu fíggjast við bummpengum. Er nakar logikkur í hesum? Eg haldi ikki. Tí er mítt tilmæli til okkar tigmenn og landsstýrismann at leggja uppskot fram um, at vega- og brúgvagerðin verður tikin burtur úr lógini um fast samband um Vestmannasund. Kostnaðurin av hesi vegagerð er slakar 24 mió. krónur umframt rakstraraútreiðslur í 15- 20 ár.

Tað er ikki neyðugt hjá tykkum at takka mær fyri hetta tilmæli. Hetta var so lítið, men hevur stóran týdning fyri tey, sum skulu nýta Vágatunnilin.

Næsta stigið á Vágalandinum:

# Tunnil millum Vatnsoyrar og Oyrargjógv!

**Jóanis Nielsen**
*løgtingsmaður*

Tað er ein kostnaðarmikil ætlan, men tá ið flogvøllurin verður útbygdur, liggur væl fyri at taka grótið úr tí tunlinum at leingja flogvøllin við.

Vágafólk eru ógvuliga fegin í hesum døgum, nú skotið er ígjøgnum undir Vestmannasundi. So fegin, at tað munnu vera tey allarfægstu, ið hugsa nakað um ta ferðslu, ið verður, tá undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi verður alment tikin í nýtslu, seinast í hesum árinum.

– Tað er, sum er longu bæði nógv og tung ferðsla ígjøgnum bæði Miðvág og Sandavág. Tá undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu, fer henda ferðsla at økjast munandi.

Næsta uppgávan, sum stendur fyri framman, er tí, at leiða ferðsluna útum Miðvág og Sandavág.

– Talan er jú um landsveg, so tað verður ein landsuppgáva. Og tað verður neyðugt at raðfesta hetta frammarliga, tí bygdirnar báðar tola ikki ta ferðslu, ið verður – fyri ikki at tala um trygdina.

Skúlin á Giljanesi liggur mitt í hesum ferðslukervi, og tað er, og fer at verða sera vandamikið at senda børnini í skúla, antin tey so eru til gongu, á súklu ella við bussi.

### Tvær flugur…

Tí er rætt, at umhugsað at gera ein tunnil av Vatnsoyrum til Oyrargjógv.

Tað er ein kostnaðarmikil ætlan. Men her hevði borið til at sligið tvær flugur við eitt smekk. Tí tá ið flogvøllurin skal útbyggjast – og tað verður neyðugt, ongantíð ov skjótt – so kundi grótið úr tunlinum verið nýtt til at leingja flogvøllin við.

Hetta hevði sjálvandi beint alla ta nógvu ferðsluna uttan um Sandavág og Miðvág, eins og tað hevði stytt væl um farleiðina á flogvøllin, til Sørvágs, Bíggjar og Gásadals.

– Hetta er í hvussu er nakað, ið eigur at umhugsast. Og hóast eingin cost/benefit kanning er gjørd av júst hesum tunlinum, so kundi tað væl hent seg, at ein slík hevði víst fyrimun við einum tunli, ikki minst tá hugsað verður um tryggleikan í ferðsluni.

# Hví vilja tit útrudda x'ið?

**Búi Tyril**

Hví acceptera føroyingar tann ørskapin, ið gongur út upp á at lúka burtur góð orð, natúrligar vendingar og væl innarbeiddar stavingarmátar? Tann føroyska "málrøktin" kann upplivast sum ein puritansk spennitroyggja, ið ikki eigur sín líka nakra aðrastaðni í allari verðini. Hon kennist mangan sum eitt ok, eitt málsligt fongsul sum avmarkar og skerjir og gevur fólki allar møguligar forðingar. Tak tey geografisku nøvnini sum hesi seinastu árini eru vorðin perverterað: Europa til Evropa, Mexico til Meksiko, Thailand til Teiland, Chile til Kili os.fr. Tað er sum um onkur vil lúka burtur stavir sum X og C úr málinum og leggja lortin í altjóða viðtøkur! Hvussu vilja málsligu puritanarar t.d. kalla eina thai ella texmex restaurant? Ein freistast til at spyrja: hví gera lívið súrt fyri føroyingin bara fyri at konstruera eitt mál eftir íslendskum ella onkrum øðrum meira ella minni fantastiskum leisti? Eg meini so við, vit føroyingar hava eina útviklað eina "bleytari" úttalu enn t.d. íslendingar – hví skulu vit krossfestast til at siga Evra (tað ljóðar ikki pent, "Evvvrrrra") ístaðin fyri tað meira eleganta og altjóðaliga Euro? Soleiðis kundi eg skrivað eina heila bók men eg steðgi her fyri nú.

# Føroyingar og heilsutrupulleikar v.m.!

**Hans Birgir Hansen**

Eg havi áður alment mótmælt arvagransking í Føroyum. Arvagransking og granskingarstovnar eru fullkomuliga óneyðug, tá tað finnast alternativir viðgerðarhættir her á landi. Eg kann vísa á búskapar- og samfelagsligan týdning við at broyta lívs-, kost- og nýtsluvanar hjá øllum bólkum av føroyingum, ið hava heilsutrupulleikar v.m. Tað finst náttúruheilivágur á danska og føroyska heimamarknaðinum, ið kann lekja føroyingar fyri allar deyðiligar sjúkur/fylgisjúkur. Náttúruheilivágur, ið ein kann fáa fatur á. Tað er við hjálp av náttúruheilivági og náttúruúrdráttum, at ein vann sær heilsu og økta vælveru aftur, og nú skal ein útbyggja sær góða heilsu. Tað er ein hópur av føroyingum, sum vóru uppgivnir av læknum, ið hava vunnið sær heilsuna aftur við hjálp av áðurnevnda. Hví ikki fáa roynt slíkt í dag? Eg havi áhuga í at taka hendan táttin upp aftur í bløðunum, og vil eg heita á allar lesarar um at geva sær neyðuga tíð at lesa heilsu/læknateigar. Tað hevur avgerandi týdning at kunna seg um, umveg til sjúku og lívið, ið ein kann vísa tykkum á úti á upplýsandi heimasíðu á internetinum.

Tað skal vera alment funnist harðliga at øllum, ið leggja fót fyri, at føroyingar vinna sær heilsuna aftur, hvat allir lækna-autoritetir gera í dag!

Tað er stórur munur á heilivágsfyritøkum og teimum við náttúruheilivági og -úrdráttum, ið eru úti á tí føroyska heimamarknaðinum. Tað hevði verið gott, um lesarar, ið kenna fólk við heilsutrupulleikum v.m. gjørdu vart við meg.

PS: Vitja heimasíðuna www.faroeinn.fo



## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

### Allur laksur minstaprís

Nógv bendir á, at ES-nevndin fer at seta minstaprís á allan laks, sum verður innfluttur úr øðrum londum.

Nevndin hevur annars arbeitt við einum uppskoti um at taka av minstaprísin, sum er galdandi fyri norskan laks, men sum skilst ber ikki til at fáa semju um tað. Tí verður úrslitið helst, at skipanin við minstaprísi fer at umfata allan innfluttan laks - hetta fyri at sleppa undan at gera mun á norksum laksi og laksi úr øðrum londum.

Seinastu árini hevur norska alivinnan ikki megnað at halda minstaprísin, og fleiri norskir útflytarar hava tí snýtt við útflutningstølunum fyri at sleppa uttan um skipanina.

Danmark hevur roynt at fáa minstaprísskipanina setta úr gildi fyribils, og málið hjá stjórnini er at fáa skipanina burtur seinni.

### Íløgurnar veksa

Donsku íløgurnar í teimum eysturevropeisku londunum eru nógv øktar seinastu árini.

Tann serligi íløgugrunnurin fyri Eysturevropa, sum hjálpir donskum fyritøkum at fáa fótin fyri seg eystanfyri, játtaði í fjør 485 milliónir krónur til ymsar verkætlanir í Pólandi, Baltalondunum, Kekkia, Ungarn, Russlandi, Slovakia, Rumenia og Ukraine. Játtanin var heili 48 prosent størri enn í 2000.

Síðani 1990 hevur íløgugrunnurin fyri Eysturevropa játtað góðar tríggjar milliardir krónur til 310 verkætlanir. Umleið 70 prosent av pengunum eru farnir til verkætlanir í teimum londunum, sum ætlandi fáa limaskap í ES í næstum. Tá londini koma upp í ES, verða ikki fleiri pengar latnir til verkætlanir í hesum londunum.

# ES góðtekur framferðina í Guantanamo

**ES heldur ikki, at fangarnir í Guantamamo fáa ómenniskjaliga viðferð**



*Myndir sum hendan hava fingið myndugleikar og felagsskapir at mótmæla viðferðini, sum fangarnir í Guantanamo fáa*

*Mynd: Reuters*

Spania hevur í løtuni formansskapin í ES, og spanski uttanríkisráðharrin, Josep Piqu, segði í gjár, at ES fer ikki at mótmæla viðferðini, sum fangarnir úr Afghanistan fáa á amerikansku herstøðini í Guantanamo á Kuba.

Josep Piqu legði afturat, at ES er ikki í iva um, at amerikansku myndugleikarnir virða tey rættindi, sum fangarnir hava. Hann segði, at ES er av somu uppfatan sum amerikananarnir, at fangarnir eru ikki vanligir krígsfangar, men yvirgangsmenn.

– Men tað merkir ikki, at teir ikki skulu hava somu rættindi sum onnur, legði spanski uttanríkisráðharrin afturat.

Uttanríkispolitiski samskiparin hjá ES, Javier Solana, bað mánadagin amerikansku myndugleikarnar virða rættindini hjá fangunum samsvarandi altjóða sáttmálum um krígsfangar.

- Tað, at vit hava verið fyri einari yvirgangsatsókn, eigur ikki at fáa okkum at víkja frá okkara egnu virðum, segði Solana á einari ráðstevnu í Spania.

Fleiri mannarættindafelagsskapir, teirra millum Amnesty International, hava biðið spanska formansskapin í ES krevja, at USA virðir rættindini hjá fangunum á Kuba.

# Seinasta óhefta sjónvarpsstøðin í Russlandi stongd

**Tann seinasta óhefta sjónvarpsstøðin, sum kundi síggjast um alt Russland, TV6, noyðist nú at steðga sendingunum**

Leiðslan í TV6 hevur ligið í stríði við dómsvaldið í langa tíð, og eftir booðum frá dómsvaldinum er støðin nú stongd. Tað hendi gjáranáttina, tá el-veitingin til sjónvarpshúsið varð slitin.

Ein minnilutaeigari í felagnum, sum eigur TV6, hevur kravt felagið á húsagang, og leiðslan í sjónvarpinum sigur, at hann rennur ørindi fyri politisku leiðsluna í Kreml.

Stjórin í TV6, Jevgenij Kiseljov, segði í gjár, at myndugleikarnir høvdu kvett el-veitingina mitt á nátt, og at telefon- og internetsambandið hjá støðini eisini varð kvett. Stutt frammanundan hevði leiðslan fingið at vita, at myndugleikarnir høvdu tikið sendiloyvið hjá TV6 aftur.

Ein av teimum størstu eigarunum í TV6 er Boris Berezovskij, sum fleiri ferðir hevur funnist hvassliga at politikkinum hjá Vladirmir Putin, forseta. Sambært leiðsluni í TV6 eydnaðist tað myndugleikunum at fáa oljufelagið LUK-oil, sum eigur at lítlan part av partapeningínum í sjónvarpinum, at fáa TV6 viðgjørt sum trotabúgv. Mannagongdin hevur fingið eygleiðarar at halda, at avgerðin hjá rættinum at steðga sjónvarpinum var bíløgd úr Kreml, og málið verður mett sum eitt ógvuliga grovt álop á pressufrælsið.

Úr Norðurlondum:

### Príslækking loysir seg

Ein kanning, sum svenska jarnbreytarfelagið Statens Järnväger hevur gjørt, kemur til ta niðurstøðu, at felagið hevði fingið eitt betri fíggjarligt úrslit, um prísurin á ferðaseðlum varð lækkaður 20 prosent.

Árliga ferðast 99 milliónir ferðafólk við svensku jarnbreytunum, og tað merkir, at tokini koyra hálvfull. Sambært kanningini høvdu ferðafólkini verið væl fleiri, um ferðaseðlaprísurin varð lækkaður 20 prosent. Úrslitið hevði verið, at rakstrarúrslitið hevði batnað einar 250 milliónir krónur.

Svenska jarnbreytarfelagið hevur fíggjarligar trupulleikar og hevði 100 milliónir krónur í halli í 2001.

### Umhugsa at keypa ferjurnar

Tey, sum búgva á dansku oynni Fanø, eru í døpurhuga, eftir at tað er komið fram, at almenna dansk-týska felagið Scandlines umhugsar at selja ein part av sínum ferjum. Felagið eigur m. a. ferjurnar, sum sigla millum Fanø og Esbjerg.

Hóast Scandlines ikki hevur sagt, at hendan ferjuleiðin verður seld, eru fólk á Fanø longu farin at fyrireika seg til eina møguliga sølu. Tey bera ótta fyri, at okkurt útlendskt reiðarí fera at keypa ferjurnar við tí fyri eyga at vinna pening burtur úr sambandinum. Tey bera eisini ótta fyri, at eitt útlendskt reiðarí hevði skarvað fleiri rutur av verandi ferðaætlan.

Nú um dagarnar var fundur á oynni, har fólk komu til ta niðurstøðu, at verða ferjurnar lýstar til sølu, eiga tey, sum búgva á Fanø, at keypa tær. Ætlanin er so, at øll tey 3300 fólkini á oynni skulu eiga felagið. Roknað verður við, at ferjurnar kosta einar 100 milliónir krónur, og Fanøbúgvarnir ætla sær at savna 30 milliónir krónur til keypið.